## VIÐMERKINGAR

# Ríkiseind og 1814

**Zakarias Wang**



Ríkiseindin

Eg eri spurdur, um vit eru í einari ríkiseind.

Tað eru vit.

Í hesum er einki nýtt. Tað hava vit nevnliga verið síðan 29. august 1450, tá norska og danska ríkisráðið við Marcellus erkibiskuppi á odda gjørdu ein sambandssáttmála. sum ásetti at Noreg og Danmark, sum longu høvdu valt sama mann til kong, eisini skuldu vera saman á jøvnum føti í kríggi og friði. Tá hildu Noreg og Danmark uppat at vera sjálvstøðug ríki og gjørdust partar av eini nýggjari fólkarættareind, sum bæði ríkini høvdu eins nógv ræði á. Tí ber til at siga, at talan er um eina ríkiseind, so sum gjørt verður í heimastýrislógini.

1814

Harumframt eri eg spurdur, um vit í 1814 gjørdust ein partur av Danmark.

So er ikki.

Í 1814 læt okkara norski kongur Eysturnoreg frá sær, men var framvegis kongur í Vesturnoreg (Grønlandi, Føroyum og Íslandi). Hvørki í 1814 ella seinni er tað komið upp á tal at niðurleggja deilríkið Vesturnoreg og gera tað til ein part av deilríkinum Danmark. Tað stendur nevnliga í samríkjasáttmálanum frá 1450, at tey innbornu í hvørjum ríki sær stýra tí. Skulu vit innlimast í Danmark, skulu vit, sum búgva í Vesturnoreg (t.e. Grønlandi og Føroyum og til 1918 eisini íslendingar), undir einum samtykkja hetta.

Vit vita væl, at tað ofta er komið fyri, at tað sambandsríki ella unión, sum vit gjørdust ein partur av í 1450, í sáttmálum við onnur ríki hevur verið nevnt Danmark. Orsøkin til hetta er, at henda uniónin ikki hevur nakað alment navn. Sambandssáttmálin ásetir ikki hvussu henda nýggja uniónin skal eita. Sum kunnugt góvu vit í 1661 kongi alt lóggávuvald, gerðarvald og dómsvald, og tí fekk hann eisini rætt til at gera sáttmálar við onnur ríki. Tá gjørdist tað alt meir vanligt, at henda navnleysa fólkarættareindin í slíkum sáttmálum varð nevnd Danmark. Men sjálvt um slíkir sáttmálar fevndu um hertogadømini Slesvík og Holstein, so blivu tey ikki innlimaði í Danmark fyri tað, og tíansheldur varð kongsríkið Noreg innlimað av slíkum sáttmálum.

Í hesum hendi eingin broyting í 1814. Vit eru framvegis í unión við Danmark, men eru ikki partur av Danmark. Kongur hevur rætt at gera sáttmálar við onnur ríki, har hann sigur seg umboða Danmark í týdningi av uniónini millum Vestnoreg og Danmark. Men framvegis liva vit undir tí sama sambandssáttmála, sum sigur at vit, ið her eru innborin, stýra ríki okkara, og at stig, sum skulu takast í uttanríkispolitikkinum, bert kunnu takast um báðir partar eru samdir um tey.

Tey vandamál, ið kunnu taka okkum av fótum, eru hin vegin knýtt til arvaeinaveldislógina frá 1661, sum varð samtykt einmælt á einum eykaløgtingi í Tórshavn tann 14. august 1662. Hetta er stjórnarskráin ella grundlógin fyri Grønland og Føroyar, og hon sigur, at vit lata frá okkum alt lóggávuvald, gerðarvald og dómsvald til kong. Tí hava vit ikki rætt til at gera sáttmálar við onnur ríki, og vit hava einki mark sett fyri, hvørjar ásetingar ið kunnu standa í slíkum sáttmálum.

So leingi vit liva undir hesi stjórnarskrá hava vit onga trygd fyri, at okkara sambandsríki ikki ger ein sáttmála við onnur ríki um at tað vald, vit hava givið kongi, verður latið frá honum til útlendskar stovnar, sum vit yvirhøvur ikki hava tomur á.

Tað er hetta, sum nú er upp á tal, tí nú skal ein nýggjur ríkjasambandssáttmáli gerast millum nógv lond í Evropa.

Tað er hesum, vit skulu vera á varðhaldi fyri, og tí er tað umráðandi neyðugt hjá okkum at fáa tað vald aftur, sum vit við 1661-stjórnarskránni lótu kongi upp í hendur.

### Karaktermorð í nýggjari tíð 4:

# Ekskursión i undirgrundini

**Jón Ellendersen**



"Fyri fyrstu ferð hevur ein kvinna í føroyskum politikki megnað at leitt ein flokk úr politiskum stórtrupulleikum til at verða størsti flokkur á tveimum fylgjandi løgtingsvalum. Sjálv megnaði hon eisini at gerast toppskorari í flokkinum báðu ferðirnar - og í fyrra førinum fekk hon enntá flest atkvøður í øllum landinum. Kortini varð kritikkurin av henni so ógvusligur, at hon segði seg taka valúrslitið til eftirtektar og valdi at leggja frá sær, sum forkvinna í flokkinum.

Í prosentum varð flokkurin nr. 1

Lurtaði ein bara eftir kritikkinum og lat verða við at fylgja við tølunum, skuldi ein trúð, at flokkurin varð endaður á 4. plássi. Men í prosentum varð flokkurin nr. 1. Ein skuldi eisini trúð, at forkvinnan kom inn sum vara ella sum eykavald. Men hon varð hinvegin 1. vald við yvir 600 atkvøðum." *Annita á Fríðriksmørk, 31.01.2004 á heimasíðuni hjá Tjóðveldisflokkinum.* Eg haldi hetta er ein tragisk hending, men samstundis ein flott gestus frá Annitu, at hon tekur Lisbeth til sín á ein so stórsinnaðan hátt.

Tað var ógvusligt at lesa, hvussu Lisbeth var úrlatin aftaná, at hon hevði sagt seg frá sum formann. Eg skal ikki mótmæla, at hon "dummaði" seg, men hon hevði als ikki uppiborið at verða úthongd á ein slíkan vamlisligan hátt. Men sum Annita vísir á, tað er legalt í Føroyum at fremja karaktermorð á eina kvinnu, bert tí hon er kvinna. Og tað løgna er, at aftir eru tað teir persónar, sum rópa seg sjálvar *frílyntar*, sum ganga á odda. Og niðanfyri er enn eitt dømi um, hvussu málburðurin hjá hesum "frílyntu" er ein rein "ekskursion i underverdenen".

**Og so fær Sjálvstýrisflokkurin av at vita**

" …. ringasta, ið kann henda, er, um Sjálvstýrisflokkurin umskapast til ein Kristiligan Fólkaflokk í fáraklæðum, ið soleiðis kemur at kappast við Miðflokkin um at grava *fanatiskan lort upp úr kristinfundamentalistiska moraðsinum*, og soleiðis at framelska tað ringasta í sinnum teirra føroyingum." *Sámal Matras Kristiansen, Dimmalætting 22.01.2004.* Aðrastaðni hevur hesin sami Sámal nýtt enn sjendskari orðaval, tá hann lýsir Miðflokkin.

Nú ivist eg stórliga í, at Miðflokkurin megnar at yvirhála Sámal Matras Kristiansen í at *"framelska tað ringasta í sinnum teirra føroyingum"*, tí Miðflokkurin, appellerar hóast alt ikki til rasureinsan, eins og hesin maður støðugt hevur eggjað til í valstríðnum.

**Aftur til Annfinn Kallsberg!**

Høgni Hoydal skýrdi fleiri ferðir Annfinn Kallsberg at vera kriminellan, og kanska fólk ikki veruliga ímynda sær, hvussu álvarsamt hetta er. At ein vanligur lesari í t.d. Dimmu skýrir Anfinn sum kriminellan, er sín søk, men tá *varaløgmaður* skýrir løgmann at vera kriminellan, tá eru vit strax úti har vit hav ilt við at grynna. Var Annfinn ikki so mikið at sær komin, kundi hann drigið Høgna í rættin og, fingið hann dømdan fyri bæði hetta og onnur úttalilsir, hann hevur sett fram um Annfinn. Og tað skal Høgni vera ógvuliga glaður fyri, at Annfinn ikki gjørdi.

Eg veit ikki, hvørt Høgni Hoydal, formaðurin í tingbólki Tjóðveldisfloksins v.fl. halda seg hava *politiskan immunitet.* Men so er ikki tá tað snýr seg um lógarbrot, tí í roynd og veru, eru tílík úttalilsir lógarbrot, og tað eru ikki so fá dømi úr donskum politikki, har politikarar eru dømdir fyri tílíkt. Best kenda dømið er Glistrup.

**Og nú kom so túrurin til Johan Dahl.**

Ikki meiri enn setstur í landsstýrissessin, verður hann hunddálkaður við, ja ikki prógvandi tilfari, men illgitingum, avundsjúkukendum brigsli og líknandi. Eisini her verður farið aftur í 80ini, og neyvan skulu vit bíða leingi til næsta álopið kemur úr undirgrundini. "Í Útvarpi Føroya í gjár kom fram, at serliga Fólkaflokkurin setur spurnartekin við leiklutin hjá Johan Dahl og um hesin er skikkaður til ein landsstýrissess. *Fólkaflokkurin hevur undir samgongusamráðingunum stríðst við Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin um at tryggja Anfinni Kallsberg ein landsstýrissess, men bæði Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin søgdu seg ikki hava álit á Anfinni.*

*Undir samgongusamráðingunum heitti Fólkaflokkurin staðiliga á Sambandsflokkin taka fyrilit fyri ivasomu fortíðini hjá Johan Dahl, tí fekk fyrrverandi stjórin á Vágs Skipasmiðju ein landsstýrissess, kundi Sambandsflokkurin verða við til at seta samgonguna, løgmann og Johan sjálvan í eina trupla støðu. Fleiri vilja vera við, støðan hjá Johan Dahl minnir nógv um støðuna hjá Anfinni Kallsberg. Fólk seta spurning við, hvørt Johan Dahl er skikkaður til ein landsstýrissess, tá Anfinn Kallsberg ikki er tað.* Er hetta hevnd, ella er hetta bara vorðið ein keðiligur og skitin háttur at dríva føroyskan politikk.

**Smáir feilir gerast "stórar skandalur"**

Skal hetta vera eyðkennið fyri føroyskan politikk framyvir, verður neyvan nakar egnaður at sita í einum landsstýrissessi, tí øll hava vit okkurt drassandi aftaná okkum úr fortíðini. Og tað nýtist ikki at vera stórt, tað smáa verður blást upp, so eisini tað er "ein stór skandala". Tak nú Jógvan á Lakjuni, eisini hann fær sítt í eini viðmerking í bløðunum: *Eg* (greinskrivarin í blaðnum) *vil minna John Johannesen á, at hann fyri tveimum vikum síðan lovaði okkum c-vitaminir til tónleikin. Tí tykist tað heldur ódámligt, at hann hevur avreitt tónleikaviðurskiftini til ein flokk sum er ímóti eini frælsari mentan, til ein flokk sum kann finna uppá at seta ein mann sum Jógvan á Lakjuni at umsita mentamál. Jógvan hevur fyrr úttala seg ímóti tolsemi og fyri avmarkan av talifrælsinum*

# Til rættleiðaran Heðin M. Klein

**Kristian Magnussen**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin.*



Tjóðveldismenn eru so súrir blivnir, at teir detta um hvønn annan í bløðunum, við viðmerkingum og rættleiðingum til Guð og hvønn mann.

Sum formaður í tingbólki Javnaðarfloksins, varð eg biðin um viðmerking av Sosialinum, um umboðanina í Norðurlandaráðnum, í samband við at Tjóðveldisflokkurin á tingfundinum síðsta hósdag bað um at fáa valið av umboðum átsett. Eg segði blaðnum, at eg metti orsøkina til, at tað altíð hevur verið so, at samgonga og andstøða hava valt hvør sítt umboð, meira hevur verið tilvild enn siðvenja, tí samgongunar hava havt so smalt parlamentariskt grundarlag.

Nú er Heðin M. Klein, eisini gallsúrur, komin á vøllin við rættleiðing í Sosialinum hósdagin 12. februar, og sigur meg beinleiðis siga ósatt. Hann sigur, at hann sat í løgtinginum tá samgongan í 70'unum millum Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin, nettup, út frá eini demokratiskari áskoðan, valdi at lata andstøðuni annað umboðið í Norðurlandaráðnum, hóast samgongan hevði so stóran parlamentariskan meiriluta, at hon kundi havt valt bæði umboðini úr samgonguni.

Hvør ið sigur ósatt ella ikki mugu onnur meta um, men sum tað framgongur av notati í núverandi løgtingslimir hava fingið frá umsitingini, sæst at "demokratiska" samgongan, ið Heðin sipar til, tvær ferðir, bæði í 1976 og 1978 valdi bæði umboðini í Norðurlandaráðnum úr samgonguni, nevniliga Jákup Fr. Øregaard og Erlend Patursson.

At enda í rættleiðing síni roynir Heðin seg við søguligari málisku fyri at sáða iva um mítt politiska trúvirði. Men kanska hevur hann við hesum fingið máliskuna, sum eina boomerang, aftur í høvdið.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Vagn Foldbo, Leirvík:

# Nýggjur aðalskrivari í Heimamissiónini

**Høvuðsstýrið hjá Heimamissiónini hevur sett Vagn Foldbo úr Leirvík sum nýggjan aðalskrivara hjá Heimamissiónini. Hann tekur eftir ætlan yvir eftir Tom Skaale frá 1. mars**



Vagn er í løtuni fyrstilærari við Eiðis skúla. Hann var liðugt útbúgvin lærari frá Føroya Læraraskúla summarið 1995. Eftir hetta arbeiddi hann eitt ár á Heimamissiónsforlagnum fyrst og fremst við Missiónssangbókini.

Árið eftir fekk Vagn lærarastarv við Eiðis skúla. Síðan summarið 1998 hevur Vagn røkt fyrstalærarastarvið í skúlanum.

Frá barnaárum av hevur Vagn verið virkin í Leirvík innan skótarørsluna og frá ungum árum í missiónshúsinum. Nú er Vagn limur í stýrinum, og er hann ein teirra, sum hevur ábyrgd fyri yngra sunnudagsskúlaflokkinum í húsinum.

Harafturat hevur hann regluliga havt møti og spælt undir til felagssang bæði í kirkju og til møti. Í nøkur ár hevði Vagn Leirvíkar streingjakór, og í nøkur ár sangkórið Trinitas, sum var mannað við fólkum úr Leirvík og bygdunum har um vegir.

Í síni frítíð hevur Vagn eisini tikið hond í uppgávur innan Bláa Kross, og í nøkur tíðarskeið starvaðist hann á Heimamissiónsskrivstovuni bæði í Leirvík og Nesvík millum annað sum blaðmaður á Trúboðanum.

Formaður í sangnevndini hjá Heimamissiónini var hann í eini fimm ár, og limur í Heimamissiónsforlagnum í tvey ár.

Vagn er 34 ára gamal, sonur Maritu, f. Tróndheim við Keldu í Leirvík, og Jóhan Chr. Foldbo av Toftum. Hann er giftur Sólrun, f. Christiansen, sum er sjúkrasystir og eisini úr Leirvík, tey eiga tvey børn - Kristinu, 6 ár og Ólivar, 3 ár.

Vagn fer í fyrsta umfari í farloyvi frá fyrstalærarastarvinum í eitt ár.

Ætlandi byrjar hann í aðalskrivarastarvinum 1. mars. Tá fer Tom Skaale í starvið sum missiónsskrivari - hálva tíð út frá Meinigheitshúsinum og hálva tíð á útimissiónsøkinum.

Í sambandi við aðalskrivaraskiftið verður móttøka í Leguhúsinum í Nesvík týsdagin 2. mars frá klokkan 16 - 18.

*Kelda: Trúboðin*

Lena Gerðalíð, Klaksvík:

# Bóndakona og klinikkassistentur 55 ár



Fríggjadagin 13. februar fyllir Lena Gerðalíð í Klaksvík 55 ár. Hon er gift við Jákup Gerðalíð, tey eiga tvey børn, Astrid 35 ár, sum býr í Esbjerg, og Jógvan 17 ár, sum býr heima hjá foreldrunum.

Lena eigur tvey ommubørn, sum bæði búgva í Esbjerg. Lena er í Esbjerg á hvørjum ári, á jólum ella um summarið og vitjar. Tað eru túrar, hon gleðir seg nógv til.

Lena hevur arbeitt á Barnatannrøktini hjá Klaksvíkar kommunu í 38 ár. Tá tannklinikkin flutti frá ovaru hædd á Sjóvinnubankanum og niðan í hølið, har hildið verður til í dag, var Lena flutti við, og har hevur hon verið síðani.

Ikki kann sigast annað enn, at hon hevur verið trúgv ímóti sínum starvi og starvsfeløgum. Hon kennir hvønn krók á tannklinikkini og veit, hvar alt liggur. Lena bakkar ikki fyri teldutøknini, hon sær nýggjar møguleikar hvønn dag koma undan kavi.

Onki er at taka feil av at morgunfólk er hon. Tá vit onnur koma rennandi til arbeiðis um kapp við klokkuni, situr hon við báðum beinunum uppi á stólinum og drekkur kaffi og er klár at byrja arbeiðsdagin.

Hjartaliga til lukku við degnum

**Starvsfelagarnir**

## Dagurin

**13. februar. Benignus**, deyður umleið ár 300. Prestur í Todi í Umbriu í Italiu, sum mátti tola deyðan sum pínslarváttur.

# Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**



Kennir tú onkran í familjuni,
á arbeiðsplássinum, í grannalagnum
ella hvar tað skal vera, ið hevur ein
merkisdag sum t.d. rundan
føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag
ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv
ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:....................................................................................................
Bústaður:...............................................................................................
Bygd/býur:.........................................................Tel:..................................
Evt. arbeiðspláss:..................................................................................

Merkisdagurin er: ..................................................................................

Innsendari: ............................................................Tel:.............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 34 18 00/21 61 35, fax 34 18 01, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 45 86 86, fax 45 86 87, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 44 78 20, fax 44 95 20, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 37 53 64, fax 37 54 64, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 33 38 20, fax 33 37 20, teldupost: edvard@sosialurin.fo